GJALDSTOVAN

Almennir stovnar

Argir: November 2024
Gj. j.nr.:
(at tilskila í svari)
Tygara j.nr.:

**Ymisk viðurskifti, nú roknskapurin fyri 2024 skal verða gjørdur liðugur**

Nú farið verður undir at leggja síðstu hond á roknskapin fyri 2024, fer Gjaldstovan at biðja stovnarnar um:

- at kanna, at tíðaravmarkingar av útreiðslum og inntøkum um ársskiftið eru rættar. Sí á gjaldstovan.fo um evnið, og hvussu farið kann verða fram.
- at stemma av kreditorar um ársskiftið. T.e. at samanbera kontuavrit e.til. frá kreditorum við tær rokningar, sum eru skrásettar fyri 2024. Sí á heimasíðuni um evnið, og hvussu farið kann verða fram. Vandin er fyri, at tað eru rokningar, sum ongantíð eru skrásettar!
- at gera upp ferðaforskot og avrokna hesi.
- at gera upp møguligt endurgjald frá Barsilsskipanini.
- at avrokna yvirtíð og ferðaendurgjald fyri 2024.
- at skuld millum almennar stovnar verður avgreidd í roknskaparárinum fyri 2024.
- at sett verður av móti tapi av debitorum og støða verður tikin til, um krøv verða send til sakførara at heinta inn.
- at anlegg eru skrásett

Eru talan um viðurskifti, sum ikki eru skrásett ella eru skeivt skrásett, er gjørligt at skráseta hetta í 13. skeiði fyri 2024, sum verður latið aftur mikudagin 19. februar 2024.

Annars verður mint á øll viðurskifti, sum skulu verða staðfest í sambandi við ársenda, sí skjal EK 76, eisini eru upp á pláss.

g.v.

Gjaldstovan